**Úrskurður Ítróttadómstólsins**

viðvíkjandi kæru frá Froðbiar Sóknar Róðrarfelag

um úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya

Ítróttadómstólurin hevur viðgjørt kæru frá Froðbiar Sóknar Róðrarfelag, dagfest 21. juli 2020, um úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya, dagfestur 15. juli 2020, um reytt kort, ið givið varð gentumanningini á 5-mannafarinum Firvaldi á Eystanstevnu tann 13. juni 2020.

Í viðgerðini í Ítróttadómstólinum hava 5 nevndarlimir luttikið: Anna Rein, formaður, Jóhan Lamhauge, Børge B. Hansen, Magnus Dam og Andrass Thomsen, nevndarlimir.

Semja er millum limirnir í Ítróttadómstólinum um, at allir limir eru gegnigir til at viðgera kæruna.

Kæran er innkomin rættstundis til Ítróttadómstólin.

Grundarlagið undir viðgerðini av kæruni:

- Kæra frá Froðbiar Sóknar Róðrarfelag til Róðrarsamband Føroya, dagfest 14. juni 2020
- Avgerðin hjá Róðrarsambandi Føroya, dagfest 16. juni 2020
- Kæra frá Froðbiar Sóknar Róðrarfelag til Dómsnevndina hjá Róðrarsambandi Føroya, dagfest 23. juni 2020
- Úrskurðurin hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya, dagfestur 15. juli 2020
- Kæra frá Froðbiar Sóknar Róðrarfelag til Ítróttadómstólin, dagfest 21. juli 2020
- Dómarafrágreiðing frá høvuðsdómaranum hjá Róðrarsambandi Føroya um róðurin á Eystanstevnu
- Videoupptøka frá róðrinum við 5-mannaførum gentum
- Munnlig frágreiðing frá formanninum í Froðbiar Sóknar Róðrarfelag
- Munnlig frágreiðing frá høvuðsdómaranum um róðurin hjá 5-mannaførum gentum á Eystanstevnu
- Munnlig frágreiðing frá Róðrarsambandi Føroya
- Videobrot frá 3-2 í Kringvarpi Føroya, víst 15. juni 2020
- Skriv frá Róðrarsambandi Føroya, dagfest 27. juli 2020
- Lógir og reglur Róðrarsambands Føroya
- Lógir og reglur Ítróttasambands Føroya

Í kæruni til Ítróttadómstólin hevur kærarin sett fram ynski um at fáa munnliga viðgerð av sakarmálinum sbrt. § 5, stk. 1, í reglugerð fyri Ítróttadómstólin.

Innleiðandi kann upplýsast, at í sambandi við viðgerðina hjá Ítróttadómstólinum, hevur Ítróttadómsstólurin sent áheitan til Róðrarsamband Føroya um at útflýggja øll viðkomandi skjøl í málinum.

**Málsgongd**

Undir kappróðrinum hjá 5-mannaførum gentum á Eystanstevnu 13. juni 2020 fekk bátur nr. 10, Firvaldur, reytt kort. Undir róðrinum metti høvuðsdómarin, at Firvaldur stýrdi skeivt við tí avleiðing, at Firvaldur undir róðrinum fór av róðrarøki sínum og inn á økið hjá øðrum róðrabáti og órógvaði kappingarneytan.

Høvuðsdómarin rópti fleiri ferðir á bát nr. 10, og eftirfylgjandi rópti hann navnið á bátinum Firvaldi, um at fara í stýriborð. Høvuðsdómarin metti, at brotið var fevnt av grein 7, nr. 1 í Ávaringarskipanini og gav Firvaldi reytt kort.

Froðbiar Sóknar Róðrarfelag kærdi 14. juni 2020 avgerðina hjá høvuðsdómaranum, um at geva Firvaldi reytt kort, til Róðrarsamband Føroya.

Róðrarsamband Føroya gav ikki kæraranum viðhald við teirri grundgeving, at *"Høvuðsdómarin á sjónum hevur í høvuðsdómarafrágreiðingini víst á, at eftir at róðurin var skotin í gongd, vísti tað seg, at bátur nr. 10 Firvaldur stýrdi skeivt, soleiðis at tað ikki var pláss fyri báti nr. 11 Rókinum.*

*Rópt varð áhaldandi á bát nr. 10 Firvaldur um at stýra í stýriborð, tó uttan at gjørt varð eftir boðum frá dómaranum. Bátur nr. 10 Firvaldur fekk tí reytt kort fyri at fara av róðrarøki sínum og inn á økið hjá øðrum róðrarbáti.*

*Í grein 1 um lóg um døming hjá Róðrarsambandi Føroya er ásett, at høvuðsdómarin er hægsti myndugleikin á róðrarøkinum, og í grein 7, 1. pkt í lóg um ávaringarskipan er ásett, at róðrarbátur, við vilja ella av grovum ósketni, undir róðri fer av róðrarøki sínum og inn á økið hjá øðrum róðrarbáti, og órógvar kappingarneytan/-ar.*

*Sambært grein 9 í reglum fyri dómsnevndir hjá Ítróttarsamband Føroya hevur Róðrarsamband Føroya ikki heimild at broyta meting dómarans í kapping."*

Froðbiar Sóknar Róðrarfelag kærdi 23. juni 2020 avgerðina hjá Róðrarsambandi Føroya til Dómsnevndina hjá Róðrarsambandi Føroya.

Tann 15. juli 2020 staðfesti Dómsnevndin hjá Róðrarsambandi Føroya avgerðina hjá nevndini í Róðrarsambandi Føroya.

Dómsnevndin grundar úrskurð sín á, *"at róðrarøkið var merkt og fyrireika smb. lógini um kappróðrarøki, grein 7, um stevnur. Róðrarøkið varð góðkent av dómaranum, áðrenn fari var undir kappróðurin á Eystanstevnu."*

Dómsnevndin vísur í úrskurði sínum á, at høvuðsdómarin er hægsti myndugleiki á róðrarøkinum. At høvuðsdómarin er hægsti myndugleiki merkir, at hann tekur allar avgerðir viðvíkjandi kappróðrarøkinum og umstøðunum annars.

Tann 21. juli 2020 kærir Froðbiar Sóknar Róðrarfelag úrskurðin til Ítróttadómstólin.

Tann 26. juli 2020 var munnlig sakarmálsviðgerð í Ítróttadómstólinum í ÍSF-húsinum í Tórshavn, har umboð fyri Froðbiar Sóknar Róðrarfelag og umboð fyri Róðrarsamband Føroya møttu.

**Málslýsing**

Froðbiar Sóknar Róðrarfelag ger í kæru sínari galdandi, at gentumanningin á Firvaldi av órøttum fekk reytt kort á Eystanstevnu tann 13. juni 2020 fyri brot á grein 7, nr. 1 í ávaringarskipanini hjá Róðrarsambandi Føroya.

*Grein 7, nr. 1 ásetir:*

*Reyð kort verða givin:*

*1. Um róðrarbátur, við vilja ella av grovum ósketni, undir róðri fer av róðrarøki sínum og inn á økið hjá øðrum róðrabáti, og órógvar kappingarneytan/-ar.*

Froðbiar Sóknar Róðrarfelag fastheldur,

1. At róðurin verður ógildaður,
   ella
2. At tað reyða kortið verður broytt til gult kort. Og Drekin eisini fær eitt kort fyri at stýra skeivt og pressa Firvald,
   ella
3. At tað reyða kortið verður strikað og Firvaldur vinnur róðurin og fær stigini aftur,
   ella
4. At bátarnir rógva umróður,
   ella
5. At Róðrarsamband Føroya viðgerð klaguna og ikki bara vísur til reglugerð hjá ÍSF um dómara.

Til stuðuls fyri hesum krøvum hevur Froðbiar Sóknar Róðrarfelag gjørt galdandi,

- At manningin á Firvaldi aktaði boðini frá høvuðsdómaranum bæði áðrenn start, og tá boð komu undir róðrinum,
- At um boð vórðu givin, sum bátur ikki hoyrdi, er hetta uppgávan hjá høvuðsdómara at syrgja fyri. Teir kundu t.d. siglt heilt tætt til bátin. Hetta er teirra val. Tí er tað heilt burturvið at geva reytt kort,
- At Firvaldur ikki stýrdi skeivt av grovum ósketni ella við vilja,
- At bátarnir ikki vistu, hvørjum teir skuldu stýra eftir, tí teir sóu ikki boyurnar við teirri avleiðing, at bátarnir, tá teir fóru yvir um mállinjuna, vóru meira ella minni samlaðir í einum trunka mitt í feltinum,
- At fleiri umstøður gjørdu, at Firvaldur ikki fekk stýrt beint,
- At reyða kortið, sum varð givið, var ikki útfylt sambært reglunum hjá Róðrarsambandi Føroya.

Eftir at málið varð framlagt á munnliga sakarmálsfundinum í Ítróttadómstólinum, endurtók umboðið fyri Froðbiar Sóknar Róðrarfelag omanfyri nevndu klagupunkt, umframt at hann vísti á, at róðrarøkið sum heild ikki var nóg væl skipað.

Á sakarmálsfundinum vístu umboðini fyri Róðrarsamband Føroya til tiknu avgerðirnar og kravdu staðfesting.

**Ítróttadómstólurin skal viðmerkja**

Kærarin hevur sett fram krav um, at reyða kortið verður broytt til gult kort ella strikað, og at Firvaldur vinnur róðurin og fær stigini aftur.

Ítróttadómstólurin leggur til grund upplýsingarnar í dómarafrágreiðingini um, at kappróðrarøkið varð kannað og góðtikið, áðrenn byrjað varð at rógva á Eystanstevnu.

Ítróttadómstólurin leggur somuleiðis til grund, at sambært reglunum hjá Róðrarsambandi Føroya er høvuðsdómarin hægsti myndugleiki á kappróðrarøkinum og hevur heimild at taka avgerðir undir róðrinum.

Møguleikin hjá dómara at diskvalifisera ein luttakara í kapping er ein inngrógvin partur av flestu skipaðu ítróttagreinum og í kappróðrarhøpi verður hetta gjørt við eini skipan við gulum og reyðum kortum, sambært reglunum hjá Róðrarsambandi Føroya.

Tað er ikki nágreiniliga ásett í reglunum hjá Róðrarsambandi Føroya, hvat eitt reytt kort merkir, men Róðrarsamband Føroya hevur upplýst, at tá bátur fær reytt kort, er siðvenjan tann, at báturin fær einki stig fyri tann róðurin, tí róðurin hjá viðkomandi báti verður ógildaður. Hendan siðvenja hevur verið galdandi í mong ár, og hava kappróðrarfeløgini tikið undir við hesi siðvenju.

Ítróttadómstólurin leggur tí til grund, at í kappróðrarhøpi er eitt reytt kort ein diskvalifikatión soleiðis, at róðurin hjá viðkomandi báti verður ógildaður, og at báturin tí ikki fær stig fyri róðurin.

Við atliti til meginregluna um, at kærumyndugleiki ikki eigur at fara inn og eftirmeta eina avgerð, ið ein dómari hevur tikið í leiki, og sum byggir á meting dómarans, og at Ítróttadómstólurin ikki í hesum ítøkiliga føri heldur grundarlag vera fyri at gera frávik frá hesi meginreglu, tekur Ítróttadómstólurin ikki støðu til avgerðina hjá høvuðsdómaranum um at geva Firvaldi reytt kort.

Avgerðin hjá høvuðsdómaranum stendur tí við.

Sæð í mun til týdningin av, hvussu stóra ávirkan ein diskvalifikatión hevur fyri einstaka bátin og fyri kappingina sum heild, heldur Ítróttadómstólurin tó, at regluverkið viðvíkjandi ávaring og diskvalifikatión átti at verið endurskoðað og nágreinað, soleiðis at siðvenjan verður kodifiserað.

**Úrskurður**

Grundað á frammanfyri standandi ger Ítróttadómstólurin av at staðfesta úrskurðin hjá Dómsnevnd Róðrarsambands Føroya.

Tórshavn 27. juli 2020

Anna Rein Jóhan Lamhauge Børge B. Hansen

Magnus Dam Andrass Thomsen